# Døgnland til kanning fyri Katekolaminir

Brúkast skal 2,5 L dunkur, sum inniheldur 100 ml Saltsýru 2,5%.
Dunkurin fæst á Rannsóknarstovuni, G0, á Landssjúkrahúsinum.

1. Lat vatnið t.d. kl. 8 á morgni og koyr tað burtur

2. Samla síðan alt vatnið í dunkin til og við næsta morgun kl. 8

Skriva dag og klokkutíð – bæði tá byrjað og endað verður – á bíleggingarseðilin.

Fer okkurt til spillis er neyðugt at samla av nýggjum.

Meðan samlað verður, skal dunkurin helst goymast kalt. Lat ikki vatnið beinleiðis í dunkin, tí sýra er í dunkinum.

Set strikukotu frá bíleggingarseðlinum á dunkin.

Avlevera dunkin og bíleggingarseðilin áðrenn kl. 11 á Rannsóknarstovuni í Útistovu (Blái bygningur), ella á Rannsóknarstovuni á G0, á Landssjúkrahúsinum.

***Gev gætur!*** Dagin fyri samlað verður, eigur tú ikki at hava etið/drukkið

- Bananir
- Ananas
- Valnøtir
- Kaffi

Diagnostiski depilin
Rannsóknarstovan
Tel +298 304500, lokal 5600
Fax +298 304601